# Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- The Beach – am. filmur við Leonardo DiCaprio - Óhóskandi fyri smábørn, **14.** ***(22.15)***
- Dreingir gráta ikki – am. aut. filmur - Óhóskandi fyri smábørn, **14.** ***(00.10)***
- Gronutir gamlir menn 2 – am. skemtifilmur, **15.** ***(20.30)***
- Hús andanna – da./tý./am. filmur - Óhóskandi fyri smábørn, **16.** ***(22.05)***
- Skulu vit dansa? - japanskur kærleiksfilmur - Óhóskandi fyri smábørn, **18.** ***(21.15)***

**3+**
- Cape Fear, **17.** ***(20:45)***
- Super-modellin, **17.** ***(19:00)***
- Drepandi val, **18.** ***(19:00)***

**BBC Prime**
- Manhunt, **17.** ***(20:00)***

**Canal+**
- Drifting Clouds, **14.** ***(4:25)***
- Maðurin uttan fortíð, **15.** ***(19:00)***
- Øll siga, I Love You, **17.** ***(20:00)*** **18.** ***(11:20)***
- Repli-Kate, **18.** ***(19:00)***
- Lítil óhapp, **19.** ***(19:00)***
- Repli-Kate, **20.** ***(13:35)***
- Roadkill, **20.** ***(19:00)***
- Lítil óhapp, **20.** ***(10:55)***

**Canal+Blå**
- Maðurin uttan fortíð, **17.** ***(17:15)***

**Canal+Gul**
- Come Together, **14.** ***(21:50)***
- Time Machine, **14.** ***(23:25)***
- Øll siga, I Love You, **19.** ***(8:05)***

**DR 1**
- The Mask, **15.** ***(21:00)***
- Stóri kærleikin hjá móðir drotningini, **16.** ***(13:35)***
- Beck - Einabúgvin, **20.** ***(21:00)***

**DR 2**
- Hús andanna, **16.** ***(19:20)***
- Blinda eyga hjá løgregluni, **16.** ***(15:16)***
- Trátikin , **17.** ***(19:00)***
- Hevndartímin, **20.** ***(22:00)***
- Skeivir dagar, **20.** ***(19:40)***

**Hallmark**
- A Woman Of Substance (3+4), **20.** ***(8:30)***

**TCM**
- Hercules, Samson & Ulysses, **18.** ***(6:30)***

**TV 2 zulu**
- Maðurin tey kallaðu einglagron, **14.** ***(22:15)***
- Hey góða, eg eri deyður!, **16.** ***(15:10)***
- Split Decisions, **17.** ***(19:00)***
- Tey kallaðu hann Bulldozer, **19.** ***(11:05)***
- Bulldosarin fer út, **20.** ***(11:00)***
- Ein vakran dag, **20.** ***(20:00)***

**TV 3**
- Trý eru ein ov nógv, **14.** ***(19:00)***
- Vit eru njósnarar, **14.** ***(20:45)***
- Ace Ventura - Náttúran kallar, **15.** ***(19:00)***

**TV-1000**
- Angelo´s vendetta, **14.** ***(19:00)***
- Lone Hero, **14.** ***(2:50)***
- K-PAX, **15.** ***(19:00)***
- The Handcuff King, **18.** ***(19:00)***
- Steal, **20.** ***(19:00)***

**TVDanmark1**
- Stórbýarfrumskógurin, **14.** ***(20:00)***
- Frankie Starlight, **15.** ***(19:15)***
- Margfald av einum drápsmanni, **15.** ***(21:15)***
- The Stupids, **15.** ***(17:20)***
- Dating the Enemy, **16.** ***(21:15)***
- Without Limits, **16.** ***(23:10)***
- Ein tryggur vinnari, **17.** ***(0:00)***
- Screwed, **17.** ***(20:00)***
- The Perfect Storm, **18.** ***(20:20)***
- Without Limits, **18.** ***(0:40)***
- Dating the Enemy, **20.** ***(0:25)***

**TVDanmark2**
- Witout Limits, **15.** ***(1:30)***



**Fríggjadag 14. kl. 18.00**



### Frasier (20:216)
Frasier kennir seg gamlan og hesum finnir hann seg sjálvandi ikki í. Orsøkin til hetta er at hann ein dagin ikki minnist, hvussu sítt yndis klaverstykki eitur. Men alt hetta batnar, tá ein ung kvinna fellir fyri honum. Men, tá hann so seinni skal bjóða henni út at eta, sigur hon, at tað einans var hennara faðirkompleks, sum fekk hana at dáma Frasier.

**Fríggjadag 14. kl. 18.00**



### Garasjan - Miðvágur
Garasjan vitjar í Miðvági, og vit fáa vitjan úr Miðvági. Vit síggja eitt barnaportrett, ein heimagjørdan teknifilm, syngja og dansa samba. Aftaná Garasjuna kemur ein røð fyri ung, ið kallast Garvilt og sum snýr seg um unga reiðiliga og regluliga Harris.

**Fríggjadag 14. kl. 19.00**



### All Access: Lisa Marie Presley
Hóast hon hevur eitt tað kendasta eftirnavnið í undirhaldsvinnuni, so hevur hon megnað at varðveita sítt privatlív privat. Í hesi sending lovar Lisa Vh1 at fáa innlit í hennara lív nú hon fyrireikar hennar fyrstu útgávu nakrantíð. Hon prátar m.a. um komandi útgávuna, um kærleika, um pápa sín, um at framføra live, um Michael Jackson og mangt annað gott...

**Fríggjadag 14. kl. 20.00**



### Stórbýarfrumskógur-in
Suksessfulli handilsmaður-in Michael Cromwell skal giftast við vøkru Charlotte, men áðr-enn brúdleypið, má hann undirskriva hjúnarbandsskilnaðan sín við sína fyrrverandi konu Dr. Patricia Crom-well. Men trupulleikin er bara tann, at hon í fleiri ár hevur arbeitt djúpt inni í Amazonas frumskógini.

**Leygardag 15. kl. 19.00**



### Barna Melodi Grand Prix´ið 2003
Hugskotið hjá Danmarks Radio - eitt barna melodi grand prix - er so væl móttikið umkring í Evropa, at nú verður heimsins fyrsta evropeiska junior Melodi Grand Prix. Sent verður beinleiðis úr Forum, har teir 16 luttakararnir úr Evropa, sum ikki hava plátusáttmála og eru millum 8 og 15 ár, fara at framføra.

**Leygardag 15. kl. 19.15**



### Robbie - Live From Knebworth
29 ára superstjørnan Robbie Williams, sum í summar hevði konsert í Keyp-mannahavn, stóð á pallinum í Knebworth Enjoymentpark á eini stórari og útseldari konsert. Hetta var 2. august. So stórur eftirspurn-ingur eftir konsertatgongumerkjum vóru at tvær eykakonsertir vóru 1. august og 3. august.

**Leygardag 15. kl. 20.00**



### Ace Ventura: Náttúran kallar
Ace Ventura fer djúpt inn í Afrika fyri at finna eina hvíta flogmús, ið verður hildin fyri at vera heilaga fyri tvær stammur, sum eru í ferð við at gera klárt til kríggj. Sum vant so dummar Ace Ventura seg so ræðuliga. Hann ger seg sera illa dámdan millum tær báðar stammurnar.

**Leygardag 15. kl. 20.00**



### Satsa
SvF tekur nú uppaftur spurnarsendirøðina SATSA í nakað broyttum líki. Verturin er nýggjur, og hann eitur Heri Jacobsen.  Mannagongdin í sendingunum er broytt soleiðis, at nú eru bert tvey umfør og ein finala. Í fjør kappaðust luttakararnir um stig og møguleikan at koma í eitt semifinalu-umfar og eina endaliga finalu.

**Sunnudag 16. kl. 19.00**



### Big Brother
Nú eru einans seks íbúgvar eftir og tað eru fáir dagar inntil 27. novembur, tá avgerðin, um ta einu milliónina, fellur. Úrslitið av síðstu nomi-neringini var at Henrik, Robert og Sissal fingu, ávikavíst, sjey, fimm og tríggjar atkvøður. So nú sær tað út til at íbúgvarnir eru vorðnir troyttir av kærleiksparinum.

**Sunnudag 16. kl. 19.00**



### Kendir instruktørar: David Lynch
Nógv umtalaði David Lynch hevur gjørt fleiri meistara-verk, t.d. "Blue Velvet", "Wild at Heart", sjónvarpsrøðina "Twin Peaks" og seinasti fimurin var "Mulholland Drive". Instruktørurin og onnur sum Kyle MacLachlan og Laura Dern geva innlit í filmsheimin hjá Lynch.

**Sunnudag 16. kl. 19.40**



### Hús andanna
Filmatiseringin av Skaldsøguni hjá Isabel Allende, ið Bille August saman við Lars Von Trier hevur leikstjórnað. Eftir at systir Clara er deyð, goymir Clara seg og sigir ikki eitt orð. Men so seinni, sum vaksin kvinna, møtir hon Esteban. Tey bæði giftast og systir Esteban gerst góð vinkona við Claru.

**Sunnudag 16. kl. 20.00**



### Reyðargullið 7. partur - Á gravarbakka
Prísurin fellur fyri hvørt árið og er í dag ár 2003 so vánaligur, at tad ikki loysir seg at fiska. Øll skipini standa á sølulista og hendir einki í nærmastu framtíð, missa vit allan rækjuflotan - tað er bara ein spurningur um tíð. Hvør kann gera nakað? Var hetta søgan um reydargullid, sum hvarv?

**Mánadag 17. kl. 18.30**



### The Simpson
Eftir enn eina uppgerð við løgregluna í Springfield, orsakað av at hann hevur hugt eftir einum parti av "South Park", verður Bart settur í eitt eftirmiddagsprogram, har hann skal uppvenjast til ein betri atburð. Men her gongur tað eisini galið. Parturin hevur heitið Bart í Kríggj.

**Mánadag 17. kl. 19.00**



### Fabulous Life of Michael Jackson
Hendan sendirøðin hjá Vh1 hyggur nærri eftir mærklætislívunum hjá kendu stjørnunum. Hesuferð er tað Michael Jackson. Við einum avantgard lívsstíli og eini billión-dollara yrkisleið, dámar honum væl at keypa. M.a. hevur hann keypt sína egnu stuttleikaviðalund og ognarrættindini til øll Beatles-løgini.

**Mánadag 17. kl. 19.00**



### Kring Sahara við Michael Palin (3:4)
Í 1500 talinum var Timbuktu í Mali ein av fleiri vísindaligum miðstaðum í arabiska heiminum. Her fær Michael prógv fyri at arabisku stjørnufrøðingarnir vóru 200 ár frammanfyri Galileo! Frá Timbuktu fer hann víðari við einari kamelkaravanu, sum fraktar salt til Bilma í Niger. Saman við tuaregarunum fer Michael inn í hjarta á Sahara.

**Mánadag 17. kl. 20.00**



### Øll siga, I Love You
Romantiskur sangleiks-filmur um vøkru Duna, ið býr saman við foreldur sínum, systkininum og 88 ára gamla abbanum í eini fínari íbúð við Park Avenue í New York. Kærleiki, sangur og dansur í New York og Venedig har søgan foldar seg út. Woody Allen hevur leikstjórnað.

**Týsdag 18. kl. 20.05**



### Oliver´s Twist (30:52)
Jamie hevur hug at geva besta vini sínum, sum ger mat við einans einar steikipannu. Teir møtast í Boruough Market og gera eina heysts frittata á einum primus mitt á marknaðinum. Her fáa fleiri hyggjarar uttan iva fleiri dýr og góð ráð.

**Týsdag 18. kl. 20.35**



### Harri ringanna - ævintýrið um ringin
Hetta er bergtakandi ævintýrið um ein serligan ring og ein lítlan hobit, ein óndan gandakall og eina ferð, ið er á tremum við vandum og ævintýrum. Peter Jackson er leikstjórin í hesi stóru filmsverkætlan - filmatiseringin av trýpartaðu skaldsøguni hjá Tolkien, The Lord Of The Rings.

**Týsdag 18. kl. 20.55**



### Biker Jens - kavari í Florida
Jens ætlar at luttaka í eini sera vandamiklari ítrótta-grein - fríkavan. Hvørt ár doyggja umleið 50 bara í Evropa, í hesi ítróttagreinini. Jens skal venja seg at kava so langt niður sum møguligt uttan iltfløskur. Í fríkavan skal ein ikki bara vera væl fyri kroppsliga, men eisini sálarliga.

**Týsdag 18. kl. 23.15**



### The Tonight Show við Jay Leno
Í fótsporum Steve Allens, Jack Paars og Johnny Car-sons fylgir Jay Leno, sum ein undir-haldandi late-night vertur. Í mei 2002 kundi hann hátíðarhalda 10 ára dagin fyri hansara prátsendingar við kendum gestum.

**Mikudag 19. kl. 18.30**



### Will og Grace
Grace møtir Sumner, ið er tann vakri og sjarmerandi systirsonurin hjá Karen. Grace roynir at fáa hann út við sær at eta ella okkurt líknandi, men Karen setir allatíðina forðingar í vegin. Eisini hevur Will trupulleikar við nýggja sjeiki sínum.

**Mikudag 19. kl. 19.00**



### Supermann II
Ein yvirgangsbandi leggur eina kjarnorkubumbu í Eiffeltornið, við tí fyri eyga at oyðileggja París. Lukkutíð eydnast tað Superman, í evstu løtu, at bjarga støðuni og kasta bumbuna úti í rúmdina. Men hetta hevur eisini fylgjur úti í rúmdini...

**Mikudag 19. kl. 20.00**



### Undan væðingini: Ein føroyingur - hvat er tað? 1:3
Vit undir væðingini hava funnið tríggjar góðbitar afturat úr banda-savninum. Vit leggja fyri við einari røð í trimum pørtum, sum Tróndur Djurhuus, fyrrverandi sjónvarps-stjóri gjørdi fyri meira enn 10 árum síðani. Røðin setur spurningin, hvat ein føroyingur í grundini er. Tey flestu halda, tað er ikki nakað at spyrja um, men so einfalt er tað ikki.

**Mikudag 19. kl. 20.50**



### Human Nature
Hormonini hjá Lila geva henni hár á allan kroppin og hon er í heilum noydd at raka sær. Vinmaður hennara og vísindamaðurin, Nathan, er ein serlingur. Saman við honum møtir Lila í skógini einum manni, ið ber seg at sum ein apa. Men hvør er hesin?

**Hósdag 20. kl. 18.00**



### Frasier
Frasier og Niles møtast til ein kopp av kaffi á lokalu kaffistovuni. Samrøða teirra gongur sera væl, so mikið væl at teir gerast ovfarnir og í góðum lag. Góða lagi er við at fara av lagi, tá Martin kemur framvið vátur og í ringum hýri. Seinni kemur Daphne, sum onkur, ið skuldi eta eina máltíð við henni, hevur gloymt.

**Hósdag 20. kl. 18.30**



### Úti í náttúruni: Gandaðar løtur
Myndakvinnan Kirsten Klein elskar skýggj, har ljósið brýtur ígjøgnum, steinar sum verða slidnir av vatni og plógforur. Vanliga arbeiðir hon einsamøll, men í hesi sendingini fylgir Helle Lyster og eitt sjónvarpslið henni í leitanini eftir tí einu løtuni í náttúruni, sum kann gerast til eitt gandað motiv.

**Hósdag 20. kl. 20.00**



### Batman
Myrkri liggur yvir Gotham City og lagið í býnum er sera ringt. Eingin kennir seg tryggan, løgreglan er korrupt. Gangstaraovastin Carl Grisson og høgra hond hansara Jack Napier stýra býnum. Og hesir brotsmenn brúkar allar miðlar fyri at fáa allan býin í sínar hendur.

**Hósdag 20. kl. 21.00**



### Okkara kokkar 5. sending
Laksaterrin og heitum eplasalati, eplabakað reyðsprøkumousse fara kokkarnir at freista okkum við hesaferð. Hetta er fimta sending av 24 sendingum, har kokkarnir báðir, Gudmund og Krisvin gera alskyns leskiligan mat bæði til gerandisdag og til veitlsur. Uppskriftir o.a eru á www.svf.fo.

**Leygardagin kl. 15.00**

### Sjómansendingin Vitin
Løgmadur á Lindini.

Vit hoyra røduna sum løgmadur hevdi á Sjómansheiminum 1 november, minningardag teirra sjódlætnu. Hann lesur nøvnini á teimum sum farnir eru í árinum, og minnist teir.

Eisini hoyra vit Martin Restorff Jacobsen prest.

Vit hoyra frásagnir úr bókini „minniligar hendingar, eftir Edvard úr Svínoy" og tad er Zacharis Zachariassen í hevur skriva.

Símin Hansen leggur sendingina til rættis.


VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin


## Ítróttur

CANAL+
**Sunnudagin kl. 22.00**
NHL: Atlanta-Florida
**Mikudagin kl. 0.30**
NHL: Detroit-Columbus

CANAL+
**Leygardagin kl. 18.00**
NHL: New Jersey-NY Rangers

**Fríggjadagin kl. 20.25**
Hondbóltur: SK Århus-Ikast/Bording, kvinnur
**Sunnudagin kl. 15.15**
Hondbóltur: KIF Kolding-ASKI Ankara, menn

**Sunnudagin kl. 14.45**
V5-Travet

EUROSPORT
Tennis Masters úr Houston, USA
Snooker British Open
EM Nevaleikur, léttstungvekt úr Hamburg, Týsklandi

TV2 ZULU
**Sunnuadgin kl. 12.55**
Íshockey: Rødovre-IK Sønderjylland
**Sunnudagin kl. 21.00**
NFL: Tampa Bay Buccaneers-Green Bay Pakers

**Sunnudagin kl. 15.00**
Fótbóltur: Ongland-Danmark

TV1000
**Leygardagin kl. 21.00**
Knockout Live

**Leygardagin kl. 0.45**
NBA: Cleveland-Philadelphia
**Leygardagin kl. 2.45**
Nevaleikur: Marco Antonio Barrera-Manny Pacquiao

Golf: WGC World Cup
Golf: Seve Trophy
Nevaleikur: Amatør-stevna
HM Rugby